## Doyði eftir koppseting

Ein kvinna í 20-unum, sum búði í Oslo, doyði leygardagin – tríggjar dagar eftir, at hon varð koppsett móti svínakrími. Hetta upplýsir Statens Legemiddelverk í Noregi. Kvinnan varð koppsett við pandemrix mikudag og doyði leygardagin eftir. Legemiddelverket í Noregi upplýsir, at kvinnan var hjartasjúk, og fyribils úrslit vísa, at deyðsorsøkin helst ikki hevur nakað við koppsetingina at gera. - Tað er altíð tragiskt, tá ung menniskju doyggja, sigur yvirlæknin, Steinar Madsen. Hann leggur aftrat, at einki bendir á, at tilburðurin hevur nakað við koppsetingina at gera. - Tað hevur verið týdningarmikið fyri okkum at kanna, um tilburðurin hevur havt nakað samband við koppsetingina. Tí er líkið á kvinnuni eisini kannað so væl sum gjørligt. Legemiddelverket í Noregi sigur, at tað er serstakliga sjáldan, at koppsetingar eru orsøk til deyðsføll. - Tá nógv fólk verða koppsett yvir stutta tíð, ger tilvildin, at onkur fólk doyggja, tó at deyðsorsøkin einki hevur við koppsetingina at gera, sigur Steinar Madsen, yvirlækni.

## Íbúðin hjá Bagger seld

Luksusíbúðin hjá stórsnýtaranum Stein Bagger í Hellerup er nú seld eftir átta mánaðum. Tað skrivar íbúðarortalurin, boliga.dk. Ikki verður upplýst um hvørki keypara ella søluprís, og meklarafyritøkurnar EDC Mæglerne og Estate Mæglerne hava onga viðmerking til søluna. Íbúðin hevur útsýni yvir Tuborg havn, og er 162 fermetrar til støddar. Hon varð sett til sølu fyri næstan 15 milliónir krónur. Stein Bagger og konan Anette Uttenthal keyptu íbúðina fyri 8,3 milliónir krónur í 2004.

# Positivar metingar fyri listað




Sambært íslendsku greiningarfyritøkuni, IFS, fer rokniskapurin hjá Atlantic Pertoleum komandi ár at vísa avlop eftir skatt á 32 milliónir krónur

**Atlantic Airways, Atlantic Petroleum og Føroya Banki kunnu vísa á góð úrslit fyri 3. ársfjórðing og fyri árið samlað, meðan Eik Banki framvegis dregist við satsingar á útlendska marknaðinum**

FÍGGJARGREINGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er Virðisbrævamarknaður Føroya, sum saman við øðrum hevur gjørt avtalu við íslendsku greiningarfyritøkuna, IFS, um at gera greiningar av teimum fýra listaðu føroysku feløgunum, Atlantic Airways, Atlantic Petroleum umframt teimum báðum stóru bankunum, Føroya Banka og Eik Banka.

Atlantic Airways fær herðaklapp fyri góða stýring, og felagnum verður spátt sama endaúrslit sum í fjør, hóast áleið 50% minni virksemi.

»Generelt er virksemið hjá Atlantic Airways ávirkað av fíggjarligu og búskaparligu kreppuni. Hetta ger seg serliga galdandi við charter. Men eisini ferðafólkatalið á vanligu flogrutunum er minkað«, sigur IFS í greining síni.

IFS metir, at inntøkurnar hjá felagnum vera um 138 milliónir krónur fyri triðja ársfjórðing 2009, og tað er 23% minni, enn fyri sama ársfjórðing í fjør. Hartil metir IFS, at lækkingin í ferðafólkatalinum fer at halda fram.

Íslendska greiningarfyritøkan metir ársúrslitið hjá Atlantic Airways til góðar 14 milliónir krónur, og tað er ein millión minni enn í 2008.

»So hóast inntøkurnar falla nógv í 2009 hjá Atlantic Airways, so minka útreiðslurnar til starvsfólk og umsiting eisini nógv, umframt at avskrivingarnar minka við 10 mió. kr. Eisini minka rentuútreiðslurnar meðan rentuinntøkurnar vaksa nógv. Alt tað tilsamans ger at IFS metir at úrslitið hjá Atlantic Airways í 2009 verður á leið tað sama sum í 2008, hóast væl minni virksemi«, skrivar IFS í greining síni.

Atlantic Airways hevur ein sterkan javna við einum solvensi á 50%.

### Avlop í 2010

IFS hevur bert árligar metingar fyri Atlantic Petroleum, og hetta kemst av, at inntøkusíðan hjá oljufelagnum er so nýggj.

»IFS metir eina inntøku á 253 mió. kr. fyri 2009. Hetta er eitt sindur minni enn teirra síðsta meting, og er tað orsakað av at metingin fyri framleiðsluna er lækkað meira enn oljuprísurin er hækkaður. IFS metir nú ein miðal prís fyri oljuna á 64 $ fyri eina tunnu, samanborið við ein miðal oljuprís á 53 $ tunnununa í teirri síðstu meting. Framleiðslan hinvegin er lækkað til 720.000 tunnur fyri 2009, saman-



*Føroya Banki fer aftur í ár at koma út við einum positivum ársúrsliti...*



*...meðan Eik Banki framvegis tyngist av avleiðingunum av altjóða fíggjarkreppuni*




*Atlantic Airways fær væntandi eitt avlop í ár á 14 millliónir, ið bert er ein millión minni enn í fjør, hóast virksemið er minkað 50%, sigur IFS*